Fylgiskjal 6

Fra: Eyðhild Skaalum <eydhild@dat.fo>

Sendt: 12. februar 2019 14:10

Til: Sørin Pram Sørensen <SorinPramS@uvmr.fo>

Emne: Viðvíkjandi ll um broyting í ll um parta-og smápartafeløg (veruligir eigarar)

Góðan dag Sørin.

Dátueftirlitið hevur omanfyrinevnda lógaruppskot til hoyringar við freist at svara í dag.

Tíðin loyvir tíverri ikki einari neyvari gjøgnumgongd, og harvið eitt hoyringssvar í hesum føri, og tí setir Dátueftirlitið hesar spurningar:

Tað, sum fyri so vítt kundi elvt viðmerkingar frá Dátueftirlitinum, er spurningurin um hvørjar persónsupplýsingar, ið verða at skráseta, tað verið seg av Skráseting Føroya o.ø., og tá serliga hvørjar persónsupplýsingar verða at lata Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og Int. Kriminalitet ?

Hetta sæst ikki av lógaruppskotinum ?

Er her talan, sambært ll. nr. 73 frá 8. mai 2001(persónsupplýsingarlógin), um vanligar persónsupplýsingar § 2 nr. 1, viðkvæmar persónsupplýsingar sambært § 2 nr. 8. og/ella p-talið, sbr. § 11 ?

P-talið hevur sína serligu áseting í persónsupplýsingarlógini, og ansast má eftir, at henda persónsupplýsing verður handfarin í samsvari við lógina, um talan verður um viðgerð av hesari persónsupplýsing.

Sama ger seg galdani viðvíkjandi viðkvomum persónsupplýsingum.

Umframt er neyðugt at hava fyri eygað § 8 í persónsupplýsingarlógini, og harvið avmarkað mongdina av persónsupplýsingum til tað neyðuga o.s.fr.

Kanska hevði tað verið rætt at sett í viðmerkingarnar, at flutningur av persónsupplýsingum av landinum, krevur annaðhvørt, at Dátueftirlitið gevur loyvi til tess, ella at hetta verður fráboðað eftirlitinum. ?

Hetta sambært §§ 16 ella 17 í persónsupplýsingarlógini og kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005. § 1, 3. stk. í kunngerðini skal her skiljast soleiðis, at tað, hóast viðgerðarloyvi ikki krevst, tó skal fráboðast, at flutningur fer fram.

Vinarliga

Eyðhild Skaalum

stjóri

Postboks 300

FO-110 Tórshavn

Tel. +298 309100

Far. +298 599100

Fax. +298 309101

eydhild@dat.fo

www.dat.fo